

Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Í dag er lægsti oljuprísur síðani 2008

**Jógvan Hugo Gardar**

11.12.2015 - 14:34

Oljan.fo

Oljuprísurin er lækkaður nógv síðani fríggjadagin í farnu viku, tá oljuframleiðandi londini í OPEC høvdu toppfund. OPEC samtykti at oljuframleiðslan hjá teimum verður óbroytt næsta ár. Hetta merkir at tað kemur at floyma meir olja inn á marknaðin, enn marknaðurin hevur brúk fyri, og tað kemur at leggja meir trýst á oljuprísin..

Hetta seinasta prísfalli, tá oljuprísurin er farin undir 40 dollarar fyri fatið fyri Norðsjóvaroljuna Brent kemur aftaná at OPEC-londini ígjár løgdu fram tøl sum vísa at tey ikki hava framleitt so nógva olju sum júst nú farnu trý árini. Hetta skrivar Dagens Næringsliv.

Í løtuni verður Brent-oljan seld fyri 39,18 dollarar fyri fatið. tað er tann lægsti prísurin síðani 2008. Amerikanska lættoljan WTI kostar í løtuni 36,36 dollarar fyri fatið.